# VW Passat stationcar

**VW Passat, sum kom í eini heilt nýggjari útgávu fyrr í ár, kemur nú eisini sum Passat Variant, sum bæði er longri og breiðari enn forgangarin, hetta gevur munandi betur pláss í kabinuni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í mong ár hevur tað verið so, at VW Passat hava verið meira eftirspurdir sum stationcar enn sedan. Nú kemur so nýggi Passat, sum kom í eini heilt nýggjari útgávu fyrr í ár, eisini sum Passat Variant, sum VW nevna stationvognin. Nýggi Passat Variant er bæði longri og breiðari enn forgangarin, hetta gevur munandi betur pláss í kabinuni

At baklúkan er stór og lessihæddin lág, ger at bilurin er arbeiðsligur hjá teimum, sum hava brúk fyri einum bili til ymisk endamal eisini í síni frítíð.

Viðførisrúmið er 638 litrar, og við setrunum niðri verður tað heilar 1.731 litrar. Vørurúmið verður tá næstan 2 metrar langt og yvir 1 metur breitt.

Designið er smart og stendur einki aftan fyri sedan útgávuna. Bilurin fæst við bæði FSI bensin og TDI dieselmotorum.

Annars er Variant so gott sum sami bilur sum Passat sedan. Kabinan er innrættað eftir ergonomiskum og brúkaravinarligum prinsippum í sera góðum kvaliteti, og nógv er gjørt burtur úr, at setrini skulu vera góð at sita í. Nakkapúturnar eru aktivar, so tær t.d. verja móti koyrsilsbresti.

Servostýringin er elektromekanisk og hondbremsan er ein elektronisk parkeringsbremsa, sum verður aktiverað við einum knøtti á instrumentborðinum. Bremsan slær automatiskt frá, tá bilførarin traðkar á koblingspedalin og startar bilinum, setur í gir og aktiverar spitaran. Treytin er tó, at bilførarin er bundin í trygdarbeltið, og hann hevur latið hurðina aftur eftir sær.

Passat fæst eisini við "Hill holder", sum ger at bilurin ikki rullar eftir hæli í eini brekku. Startlykilin er ein "diskett", sum verður sett í start/stopp lyklarholið

Frá Bilasøluni í Hoyvík verður sagt, at Passat Variant verður í Føroyum síðst í september, og prísirnir byrja við umleið 300.000,- krónur.



*Nýggi Passat Variant er bæði longri og breiðari enn forgangarin*


*Við setrunum niðri er vørurúmið heilar 1.731 litrar*


*Designið er smart og stendur einki aftan fyri sedan útgávuna. Bilurin fæst við bæði FSI bensin og TDI dieselmotorum.*


*Kabinan er innrættað eftir ergonomiskum og brúkaravinarligum prinsippum*

P/F Wenzel:

# Piddi varð hepni keyparin

**Mánadagin 12. september kundi Piddi Petersen í Vági, saman við konuni, Torgerð, heinta ein spildurnýggjan Ford Ka, sum tey høvdu boðið upp á og keypt fyri 90.000 krónur í sambandi 80 ára Ford-jubileum hjá P/F Wenzel**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialuin.fo*

Í sambandi við at Fordbilarnir hava verið umboðaðir í Føroyum í 80 ár, var jubileum hjá P/F Wenzel í Akranesgøtu fríggjadagin 9. september.

Hendan dagin høvdu tær ymsu deildirnar hjá fyritøkuni fleiri góð tilboð. Bilasølan hevði ein spildurnýggjan Ford Ka 1,3i Standard, sum fólk kundu bjóða upp á. Minsta boð var 80.000 krónur.

Hepni keyparin varð Piddi Petersen í Vági, sum hevði boðið 90.000 krónur fyri bilin.

Bilurin kostaði annars kr. 122.900,- um keyparin hevur brúktan bil í býti ella 109.900,- um eingin bilur er í býti. So Piddi og Torgerð fingu ein bíligan nýggjan bil.


*Jóhan Petur Olsen, søluleiðari, hjá P/F Wensel, saman við Torgerð og Pidda Petersen í Vági, sum heintaðu hendan nýggja Ford Ka, sum tey góvu 90.000 krónur fyri*